Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Frimodt Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Lántøka til Eystur- og Sandoyartunlarnar

Spurningar:

1. Hevur landstýrismaðurin kannað møguleikan at umfíggja lánsavtaluna til Eystur- og Sandoyartunlarnar?
2. Eru ætlanir um at kanna møguleikan at umfíggja tunlarnar?
3. Er nøkur forðing fyri at umfíggja tunlarnar?

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 54 frá 6. mai 2016 § 2, stk. 3 stendur, at felagið kann taka lán og ábyrgdarlán við at útskriva lánsbrøv til verkætlanina. Landsstýrismaðurin skal í síni heild góðkenna lánstreytirnar.

Treytirnar eru broyttar munandi, síðan lán varð tikið. Tosaði við ein, sum hevur við Femern sambandið millum Danmark og Týskland at gera. Sum eg havi skilt, so er leisturin fyri fígging fyri Femern og Eystur- og Sandoyartunlarnar tann sami. Talan er um almenn partafeløg, og lánið skal niðurgjaldast við brúkaragjøldum.

Femern ætlanin kostar um 60 mia. kr. og varð roknað við, at tað tók 35 ár, til hon var goldin. Roknaða rentan væntaðist at skula liggja um 3%. Nú avtalurnar eru komnar upp á pláss, vísir tað seg sum, at rentan er negativ og at afturgjaldstíðin er stytt frá 35 árum til 25 ár, grundað á rentustøðið.

Nú tað vísir seg, at nýtslustigið av tunlunum er í lægra lagi, grundað á príspolitikk, so kundi tað verða áhugavert at fingið útgreinað, um kanningar hava verið, sum kunnu gera, at nýtsluprosentið fer upp.

Á Løgtingi, 1. oktober 2021

Frimodt Rasmussen